



## Nýggjur íslendskur sendiharri um árskiftið

Um ársskiftið fær Ísland nýggjan sendiharra í Føroyum. Eiður Guðnason, sum hevur verið íslendskur aðalkonsul síðani 1. apríl í fjør fer heimaftur, og sendiharri Íslands í Washington D.C., USA loysir hann av. Tá Eiður Guðnason tók við sum aðalkonslul, kom hann úr starvi sum sendiharri í Beijing í Kina. Tá helt hann við einum brosi fyri, at hann kom "úr tí største landinum til tað besta landið". Eiður Guðnason hevur annars eina fortíð sum alþingsmaður fyri íslendska javnaðarflokkin og sum sjónvarpsjournalistur. Nýggi maðurin í hansara stað kemur úr heimsins máttmiklasta landi, Amerika. Tað er sendimaður Íslands í Washington, Albert Jónsson.



andarhol við láninum frá LÍV

Mynd: Vilmund Jacobsen

## avtalu

ur peningur hjá einum lutfalsliga lítlum peningastovni.

- Men eg undri meg framvegis yvir, at eingin av hinum lánistovnunum vildi veita okkum hesa fígging – og heldur ikki Norðoya Sparikassi. Spurningurin er so, hvussu nógvan pening stovnarnir hava til at læta út í løtuni. Hetta er nú farið; tað er lagt aftur um, og eg eri sera fegin um avtaluna við LÍV.

### Ávirkaði valið

Steinbjørn O. Jacobsen ásannar, at tann tá óloysti likviditeturin hjá kommununi ávirkaði kommunuvalið – ikki minst fyri seg sjálvan sum tann, ið hevði høvuðsábyrgdina av kommununi og fíggjarviðurskiftum hennara.

- Høvdu vit havt loyst hetta málið fyri kommunuvalið, hevði støðan helst verið ein heilt onnur, sigur borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu.

# »Jól í svingi« í sjónvarpi

**Mánadagin 1. desember fer SvF at senda fyrsta part av jólakalendaranum, sum kemur at seta sín dám á løtuna undan Degi & Viku fram til jólar. 16 børn og 26 vaksin eiga røddirnar í søgunum, sum verða at hoyra hvørt kvøld fram til jóla**

JÓLAKALENDARI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Páll Danielsen og Súsanna Tórgarð leikstjórna »Jól í svingi«*

Í morgun avdúkaði SvF jólakalendaran, sum fer at verða sendur hvørt kvøld klokkan 18.25 í jólamánaðinum – ella beint áðrenn Dagur & Vika verður send.

Tað eru Páll Danielsen og Súsanna Tórgarð, sum hava leikstjórnað "Jól í svingi" og hava vegleitt teimum mongu børnunum og vaksnum, sum leggja røddir til kalendaran í ár.

Á tíðindafundi í morgun, har bæði børn og vaksin, sum eiga røddir í ymisku søgunum og filmunum vóru til steðar, segði Páll, at "Jól í svingi" er ein stór norsk verkætlan, sum NRK hevur gjørt í samstarvi við DR.

- Hetta eru norskir spælifilmar, sum venda sær til alla familjuna. Hyggjarar og lurtarar fáa soleiðis eina viðkomandi søgu um dagin, segði hann.

### Nógvar røddir

Páll vísti á, at tilsamans 16 børn og 26 vaksin leggja røddir til sendingarnar.

- Tað eru 72 persónar sum tosa í filmunum, har fleiri enn 88 eru við.

Leikstjórin segði, at filmirnir eru týddir til føroyskt, og føroyskar røddir eru til alt, sum sagt verður í "Jól í svingi".

Súsanna Tórgarð, sum saman við Pálli hava leikstjórnað, sigur, at tey, sum eiga røddirnar, hava havt høvi at lisið leikritið við hús og hava soleiðis gjørt sítt heimaarbeiði, áðrenn tey eru komin í studio SvF at lesa røddirnar inn.

- Børn og vaksin hava verið rættiliga ófør og dugnalig. Tey hava fyrireikað seg væl heima við hús, har tey eisini hava havt filmirnar at halda seg til og ta tøkni, sum hoyrir til hetta arbeiði.

### Flestu óroynd

Súsanna vísir á, at røddirnar skulu passa til tær á filmunum, bæði í tíð og stemningi.

- Flestu, sum vit eru, hava ikki roynt hetta áður, men eg má siga, at tey, sum vit eru, hava verið ófør, sigur Súsanna Tórgarð.

Fyrsta sending av "Jól í svingi" verður sum nevnt send mánakvøldið 1. desember klokkan 18.25.



*16 børn og 26 vaksin eiga røddirnar í »Jól í svingi«*